*– Einasta tapið, síðani vit fyrr í summar taptu stórt fyri B36, var nú mikukvøldið. So eg ivist ikki í, at vit fara at reisa okkum sunnudagin.*

*Jákup á Borg, HB*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# ÍTRÓTTUR

# Arvafíggindin skal fáa toyggið

**Í HB kvíga teir ikki fyri, at sorlið á Eiði fer at síggjast aftur móti KÍ, og í Klaksvík ætla teir at halda seg til góðu gongdina í Gundadali**

HB-KÍ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Endiliga fer HB at fáa vitjan av 102 ára gamla javnaldranum og arvafíggindanum KÍ.

Tvær ferðir fyrr í ár hevur HB vitjað í Klaksvík. Báðu ferðirnar hevur tað verið tætt og intenst. Fyrru ferðina javnaði KÍ til 2-2 í yvirtíðini, og seinnu ferðina megnaði HB at koma afturíaftur og at javna til 3-3, eftir at klaksvíkingar høvdu verið frammanfyri 3-1, inntil tað restaði eitt korter.

Einasta venjingin hjá HB millum eyðmýkingina í steypakappingini á Eiði mikukvøldið og uppgerðina móti arvafíggindanum sunnudagin verður í kvøld.

– Vit kvíga ikki fyri at spæla móti KÍ. Einasta tapið, síðani vit fyrr í summar taptu stórt fyri B36, var nú mikukvøldið. So eg ivist ikki í, at vit fara at reisa okkum, er metingin hjá Jákupi á Borg.

Mikukvøldið var HB í 1. hálvleiki í 4-4-2 útgávu, meðan teir í 2. hálvleiki vóru í 4-3-3 útgávu við Jákupi á Borg í fremstu røð.

– Tað tykist liggja best fyri hjá okkum, tá ið vit leypa á frammarlaga á vøllinum. Tað gangi eg bara út frá, at vit fara at gera á heimavølli móti KÍ, sigur Jákup á Borg.

Allir HB spælararnir eru tøkir. Vagnur Mohr Mortensen hevði verið leikbannaður tvær ferðir, og eftir góða úrslitið í Gøtu byrjaði hann á beinkinum á Eiði. Eingin ivi er um, at Vagnur verður millum teir fyrstu ellivu sunnudagin. Tað kann væl hugsast, at hann verður í miðverjuni. Mikukvøldið vísti, at tað vóru nógv hol, sum skulu tettast í HB verjuni.

### Tveir ivasamir

Í Klaksvík er fótbóltslagið hampuligt, eftir at tað sunnudagin eydnaðist at vinna triðja heimadystin í ár. Men avrikið var ikki meiri enn passaligt, inntil ÍF hevði mist ein mann, men liðavrikið var á ongan hátt sannførandi.

Í Gundadali trívast klaksvíkingar ofta væl. Síðsta dømið um hetta var 5-1 sigurin í landskappingardystinum móti B36.

– Motivatiónin er altíð í toppi móti HB, og teir báðir dystirnir í Klaksvík fyrr í summar vóru báðir rættuliga undirhaldandi, staðfestir miðvallarin Símun Joensen.

Símun hevur ikki vant í hesi vikuni orsaka av skaða í baklærinum. Hann skuldi royna at venja í kvøld. Harley Bertholdsen fór út í 1. hálvleiki móti ÍF orsaka av vøddaskaða. Harley royndi at renna hóskvøldið. Fyrr í dag var ikki greitt, um hann verður tøkur sunnudagin. Marek Wierzbicki var leikbannaður móti ÍF. Hann er tøkur aftur.



*Mest vinnandi liðini í føroyskum fótbólti hittast til dysti í Gundadali sunnudagin. HB skal reisa seg eftir eyðmýkjandi tap, meðan KÍ ætlar at halda fast um góðu avrikini á útivølli*

# Bergur liðugur fyri í ár

**ÍF manglar ein av sínum útlendsku stuðulsspælarum, meðan tey í B36 ikki rokna við, at Bergur Midjord spælir aftur í ár**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Botnliðið ÍF fær sunnudagin vitjan av B36, sum liggur á øðrum plássi. Á pappírinum er B36 greiður favorittur, men hetta leggja fuglfirðingar líka í.

– Nú eru vit seks stig aftanfyri VB/Sumba, so vit mugu savna so nógv stig sum møguligt saman, um vit skulu gera okkum nakrar vónir um framhaldandi at hava sæti í Formuladeildini komandi kappingarár.

Hetta sigur venjarin hjá ÍF, Jón Simonsen. Hann leggur afturat, at tað sjálvandi er ringt at fáa stig ímóti einum av oddaliðunum, men í tí støðu, sum ÍF er í, so er neyðugt at vinna hvønn dyst.

B36-venjarin, Sigfríður Clementsen, sigur, at B36 skal vinna allar sínar dystir, um teir skulu gera sær vónir um at fanga oddaliðið, EB/Streym.

– Ja, vit fara inn fyri at vinna hvørja ferð, og um vit skulu gera okkum nakrar vónir um at fanga EB/Streym aftur, so mugu vit eisini vinna í Fuglafirði sunnudagin.

So áskoðararnir í Fuglafirði kunnu vænta ein góðan og spennandi dyst sunnudagin, har bæði liðini ætla sær øll trý stigini, og har bæði liðini eisini hava brúk fyri øllum trimum stigunum. ÍF fyri at sleppa úr botninum, og B36 fyri at fanga EB/Streym.

### Bergur neyvar við aftur í ár

Hjá ÍF er tað stórur missur, at offensivi miðvallarleikarin, Nenad Saric ikki er við. Hann fekk reyða kortið í dystinum síðsta sunnudag í Klaksvík, og tí má hann sita uttanfyri. Venjarin hjá ÍF sigur eisini, at hetta er stórur smeitur fyri liðið.

–Nenad hevur verið góður styrkur, síðani vit fingu hann í summarsteðginum, og tí er tað ein keðilig støða, at hann ikki er tøkur til dystin sunnudagin.

Hjá B36 er allir mans tøkir. Bergur Midjord er tó eitt undantak. Hann hevur ikki spælt í nakrar vikur, og Sigfríður Clementsen sigur, at í B36 vænta tey ikki, at Bergur verður tøkur aftur hetta kappingarárið.

| | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HB-KÍ | - | 2-1 | - | 1-1 | 3-2 | 4-1 | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 4-0 | 3-0 | 3-3 | 6-2-2 | 23-12 |
| EB/S-Skála | 2-0 | 0-1 | 0-0 | 0-1 | 1-0 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 3-1-1 | 4-2 |
| NSÍ-GÍ | - | 1-1 | - | 2-1 | 1-0 | 3-2 | 1-2 | 1-1 | 1-1 | 3-1 | 2-2 | - | 4-4-1 | 15-11 |
| B68-VB/S | - | - | - | 1-3 | 2-0 | 4-0 | 1-4 | 1-2 | 0-0 | 2-1 | 0-1 | 3-1 | 4-1-4 | 14-12 |
| ÍF-B36 | 1-3 | 0-2 | 0-2 | 2-2 | - | - | - | - | 1-4 | 0-0 | 1-2 | 1-1 | 0-3-5 | 6-16 |

## FSF gevast á Oyggjaleikum

**FSF hevur nú meldað føroyska kvinnulandsliðið í fótbólti til EM-undankappingina, og samstundis er tað greitt, at landsliðið fer ikki til Oyggjaleikirnar á Rhodos næsta ár**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Á seinastu trimum Oyggjaleikunum hevur føroyska kvinnulandsliðið í fótbólti verið við á Oyggjaleikum, og har hevur liðið vunnið gull hvørjaferð. Nógvar av dystunum hevur landsliðið vunnið við sera stórum muni, og vanligt hevur tað bert verið ein ella tveir javnir dystir.

Hetta hevur fingið FSF at leita eftir einari nýggjari avbjóðing til kvinnulandsliðið í fótbólti, og nú er gjørt av, at kvinnulandsliðið skal verða við í undankapping til EM, sum verður hildin seinni í ár.

UEFA hevur broytt undankappingina soleiðis, at nú spæla nógv av londunum ein minikapping – vanliga við fýra londum – fyri at sleppa víðari til veruligu undankappingina, og tað er í einari av hesum minikappingum, at Føroyar skulu taka lut.

### Í form í november

Endaliga tilmeldingin er gjørd fyri kortum, og longu tann 9. oktober verður lutakastum, hvussu bólkarnir í minikappingunum skulu mannast. Kappingin verður hildin frá 16. til 24. november í ár, so føroysku fótbóltskvinnurnar skulu aftur í toppform tveir mánaðir eftir, at heimliga landskappingin endar tann 23. september.

Ikki fyrr enn tilmeldingarfreistin er farin afturum, verður gjørt av hvussu londini koma víðari til sjálva undankappingina, sum verður í 2007 og 2008. Vinnarin av hvørjari minikapping sleppur víðari, og næstfremstu londini skulu spæla um at koma víðari.

Venjarar hjá kvinnulandsliðnum eru Álvur Hansen og Jakob Thomsen.